








# Fyrsta skúlaskip í Føroyum um at verða klárt

**Fyrsta og einasta skúlaskipið í Føroyum verður væntandi siglingarklárt komandi summar. Men longu á Norðoyastevnu sleppa norðoyingar og onnur at síggja skúlaskipið Dragan loysa frá landi í Klaksvík**

SKÚLASKIPIÐ DRAGIN

*Ragnhild Ellingsgaard*

Hvørt ár plagar Klaksvíkar Hornorkestur at undirhalda á kaj-økinum, meðan róð verður kapp.

Soleiðis verður eisini í ár, men nú fara tónarnir ístaðin at koma úti frá sjónum.

Limirnir í Klaksvíkar Hornorkestur verða nevniliga við á dekkinum, tá skúlaskipið Dragin fer at loysa frá landi í Klaksvík.

### Fyrsta av sínum slag

Í londunum rundan um okkum er púra vanligt, at skúlar av ymsum slag hava skúlaskip knýtt at virkseminum teirra.

Hetta fyri, at næmingar í sjóvinnu og líknandi skulu sleppa at royna teirra teoretisku vitan, eisini í praksis.

Men hóast næmingar í Føroyum eisini fáa undirvísing í sjóvinnu, so hava føroyingar ongantíð átt nakað skúlaskip.

Í Klaksvík vóru fyri 10 árum síðani nakrir menn, sum ikki hildu, at hetta var rætt. Teir hildu so avgjørt, at føroyingar eisini høvdu tørv á einum skúlaskipi, og tí-skil slóu teir seg saman um at stovna eitt felag, hvørs endamál skuldi verða at fáa til vega eitt skúlaskip til føroyingar.

Felagið fekk navnið »Grunnurin Dragin«, og varð skipað sum eitt slag av einum stuðulsfelagi.

Í dag, 10 ár eftir stovnanina, hevur felagið eini 80 limir, so áhugin millum fólkið var eisini til staðar.

Hesi 10 árini hevur ein áhugabólkur uttan íhald arbeitt við Draganum, og væntandi verður skúlaskipið siglingaklárt komandi summar.

Ætlanin er, at Dragin fyrst og fremst skal nýtast sum skúlaskip hjá skúlunum í Klaksvík, meðan lærustovnar aðrastaðni í landinum kunnu leiga skipið í styttri ella longri tíðarskeiðum.

### Kostnaður 10 krónur

Fyrsta málið hjá felagnum var sjálvandi at fáa fatur á einum skipi, sum síðani kundi umbyggjast til eitt skúlaskip. Og væl gekst við hesum.

Fyrst í nítiárunum fingu skip í Føroyum upphøggingarstuðul, og millum hesi skip taldist eisini Dragin, sum eftir ætlan skuldi søkkast.

Men Hans Eli Hansen, formaður í »Grunnurin Dragin«, gjørdi skjótt av, og keypti Dragan frá táverandi eigarinum. Kostnaðurin var 10 krónur.

– Eigarin varð glaður við, at onkur var so býttur at keypa bátin. Sum var, hevði hann einans útreiðslur av Draganum, og ætlanin var jú at søkkja hann. Tí fekk eg hann so bíligani, flennir Hans Eli.

Eftir keypið varð ein áhugabólkur settur at arbeiða víðari við bátinum, og er Dragin í dag vorðin sum nýggjur.

Hóast alt arbeiðið hevur verið ókeypis og uttanfyri vanliga arbeiðstíð, so hevur gingist væl í hond, og er Dragin nú um at verða siglingarklárur.

Alt timburarbeiðið umborð er nærum liðugt, so nú stendur einans el-arbeiðið fyri framman. Harumframt skal trygdar- og bjargingarútgerð eisini finnast, og so er klárt at leggja til havs.

### Framsýningar

Men arbeiðið umborð hevur ikki verið tann størsti parturin av fyrireikingunum til skúlaskipið.

– Alt arbeiðið hevur sjálvandi kostað nakað av peningi, og hava vit lagt nógva orku í at finna stuðlar ymsastaðni, greiðir Hans Eli frá.



*Skúlaskipið Dragin verður væntandi siglingarklárt komandi summar*

Stuðul hava teir fingið frá peningastovnum, virkjum, fyritøkum og privatfólki. Summi hava eisini latið felagnum ymsar gávur, sum teir kunnu nýta umborð á skipinum.

Umframt stuðul frá øðrum, hevur felagið eisini lagt nógv arbeiðið í sjálvt at fáa pening til vega.

Hetta hevur verið gjørt gjøgnum framsýningar av ymsum slag, tombolu og lutaseðlasølu. Eisini gevur felagið hvørt ár eina streymtalvu út, sum síðan fæst til keyps kring landið.

Á Norðoyastevnu plagar felagið eisini at skipa fyri framsýningum, og so verður aftur í ár.

Framsýningin hesuferð er býtt sundur í tveir partar, har tann eini hevur heitið »Hendur og Hugflog«. Her sýna listarfólk í Klaksvík fram áhugaverdar lutir, ið tey sjálvi hava tilevnað.

Hin parturin er ein myndaframsýning hjá Klaus Kieselwetter, sum sýnir djóralívið í Antarktis.

Børnini verða heldur ikki gloymd. Felagið hevur heitt á teir báðar klovnarnar, Fjotta og Bobo, um at koma á eina vitjan í Klaksvík. Teir søgdu ja, og fara teir uttan iva at gera sítt til, at børnini fara at hava tað enn stuttligari á Norðoyastevnuni.

# Tær stríðast av øllum alvi

**Ein eigur at royna at skipa fyri onkrum sjálvur, heldur enn bert at sita og bíða eftir, at onnur skulu koma við tilboðum. Hetta heldur manningin umborð á Old Girls 2 hjá Klaksvíkar Róðrarfelag**

KAPPRÓÐUR

*Ragnhild Ellingsgaard*

Nógv hevur verið at hoyrt um Klaksvíkar Róðrarfelag ta seinastu tíðina. Og vónirnar til felagið eru stórar, nú skjøtil verður settur á komandi kappingarárið.

Hóast vit hoyra og lesa nógv um tær ymsu manningarnar hjá felagnum, so hevur nærum einki verið at hoyrt um Old Girls-manningarnar.

Møguliga, tí tær ikki hava hug at reypa so nógv. Tær rógva einans til stuttleikar, siga tær.

Men hvussu er og ikki, so veksur hetta slagið av manningum ikki á trøunum her í Føroyum. Ja, óvist er, um slíkar finnast aðrastaðni enn bert í Klaksvík.

### Tungt at byrja

Hetta byrjaði alt í apríl mánaða.

Í longri tíð hevði Árna Maria Fossdalsá gingið og hugsað um, at tað hevði verið stuttligt at byrjað at róð saman við øðrum tilkomnum kvinnum. Árna Maria hevur búð í Danmark, og róði tá í Føroyingafelagnum. Ein dagin, tá hon stendur og hyggur at kappróðri, kemur hon í prát við eina aðra tilkomna kvinnu.

Tær práta saman aftur og fram, og bradliga brestur úr Árnu Mariu: Also, tað má verða lekkurt at rógva. Heldur tú ikki eisini tað?

Hin kvinnan var púra samd við henni, og lunnarnir til eina nýggja bátsmanning vóru hervið lagdir.

Tíðindini fréttust víðari í býnum, og eftir stutta tíð vóru tær nóg nógvar til at manna eitt fimm-mannafar.

Og so varð farið í gongd.

Fleiri av nýggju manningini høvdu ongantíð róð fyrr, so tungt var í byrjanini.

Men saman funnu tær skjótt rætta áralagið, og nú rógva tær sum ongantíð fyrr.

Í byrjanini hittust tær tvær ferðir um vikuna, men fyri stuttum broytti tær venjingatíðirnar til heldur at verða tríggjar ferðir hvørja viku.

Og tær trívast óføra væl saman. Tíðin umborð fer við nógvum práti, onkuntíð ov nógvum. Men tá sigur bátsforkvinnan til, og biður tær rógva, heldur enn práta.

– Orsøkin til alt prátið er nokk, at vit halda okkum allar ráða umborð, sigur Árna Maria smílandi.

### Onkur hug at flenna



*Onkur hevði hug at flenna eitt sindur, tá tilkomnu kvinnurnar fóru at manna bát. Men tær trívast bara óføra væl umborð*

Onkur hevði hug at rysta við høvdinum, tá tey fingu við, at hesar tilkomnu kvinnur vóru byrjaðar at rógva.

– Onkur helt, at vit máttu vera púra forstýraðar í høvdinum, sigur Árna Maria.

Serliga menninir høvdu hug at flenna eitt sindur at hesum gomlu konunum, sum nú vildu halda seg duga at rógva.

Men onnur tóku eisini til orða, at tær vóru óførar. Tað halda tær eisini sjálvar, nú árabløðrur og vánaligur teknikkur er farið aftur um bak.

Fyri stuttum skipaði Klaksvíkar Róðrarfelag fyri einum stuðulsróðri til frama fyri nýggju bátarnar hjá felagnum, og sjálvandi luttóku Old Girls 2 eisini í hesum róðri.

– Vit væntaðu okkum at klára at rógva einar 4.000 metrar, men tá avtornaði, høvdu vit róð heilar 12.000. So tú kanst ætla, at vit vóru stoltar, flennir Árna Maria.

Við góða úrslitinum fekk pípan eitt annað ljóð, og hevur tað eisini verið nýtt til at minna onnur á, at hetta væl kann lata seg gera, hóast tær ikki longur eru eins ungar sum fyrr.

### Einans til stuttleikar

Fyribils er rógvingin heldur til stuttleikar enn álvara. Tær hava allar børn heima við hús, og kenna seg tískil ov bundnar til at fara avstað á hvørja stevnu at rógva kapp við aðrar manningar.

Men á Norðoyastevnu verður stuttleikin tó avloystur við álvara, í øllum førum eina løtu.

Old Girls 2 er nevniliga ikki einasta kvinnumanningin hjá Klaksvíkar Róðrarfelag.

– Tá vit byrjaðu at rógva, funnu vit útav, at ein onnur kvinnumanning hevði vant innandura allan veturin, greiðir Árna Maria frá.

Á Norðoyastevnu hava kvinnurnar skipað fyri dysti millum kvinnumanningar báðar. Tá skal finnast útav, hvør av teimum er betri og skjótari.

– Hetta eru vit ótrúliga spentar uppá, sigur Árna Maria.

Sum er, hava tær onga hóming av, hvussu skjótt tær rógva, ella hvussu gott tær duga. Men hesin spurningur verður so svaraður á stevnuni.

Og áhugin fyri júst hesum róðri er eins stórur og fyri teim »veruligu« róðrunum.

Fólk í býnum hava fylgt væl við í gongdini hjá kvinnumanningunum, og mong eru sera spent uppá úrslitið av kappróðrinum millum Old Girls 1 og Old Girls 2.

– Hetta verður alt sjálvandi gjørt mest til stuttleika, sigur Árna Maria.

Tá ein hyggur eftir róðrinum hjá kvinnumanningini, ivast ein heldur ikki í, at tær hava tað stuttligt. Tær flenna og práta, sum hava tær kenst alt lívið.

– Persónliga gevur samanhaldið umborð ótrúliga nógv, sigur Árna Maria, sum eisini vil nýta høvi til endiliga at biðja onnur um at fara í gongd við onkrum tílíkum sjálvi.

– Hetta er bæði stuttligt og gott fyri heilsuna, so tað er bara at fara í gongd, endar hon samrøðuna við Sosialin.